**UTTAN ÚR HEIMI**

## Bøtur bøta um trygdina

Fyrradagin gjørdi ein dómstólur í USA av, at oljufelagið ExxonMobil skal gjalda 30 milliardir krónur í endurgjaldi umframt rentur fyri skaðan, sum stóðst av dálkingini, tá tangaskipið "Exxon Valdez" fór á land í Alaska í 1989.

Óttin fyri slíkum vanlukkum og risastórum endurgjaldskrøvum hevur fingið oljufeløgini til at seta tangaskipunum størri krøv, skrivar Aftenposten. Rannveig Stangeland, kunningarstjóri hjá Statoil, sigur við blaðið, at norska oljufelagið setir tangaskipunum sera strong trygdarkrøv. Hon vísir á, at meðalaldurin á tangaskipum í altjóða sigling er átjan ár, men tangaskipini, sum Statoil nýtir, eru bara seks ára gomul í meðal. Harafturat nýtir Statoil at kalla bara skip, sum eru tvískinnað, sigur hon.

Skipini, sum flyta olju fyri Statoil, verða eisini kannað regluliga. Í fjør vóru 1.000 slíkar kanningar, og níggju skip vórðu mett at vera í so ringum standi, at tey sleppa ikki at flyta olju fyri felagið longur.

## Arbeiðsloysið veksur

Arbeiðsloysið í Danmarks veksur framvegis, og tey seinastu tølini vísa, at um ársskiftið høvdu 6,6 prosent av teimum arbeiðstøku einki arbeiði. So stórt hevur arbeiðsloysið ikki verið í hálvt sætta ár.

Vinnuráðið hjá fakfeløgunum væntar ongan bata teir fyrstu mánaðarnar. Tann veiki amerikanski dollarin kemur donsku útflutningsfyritøkunum illa við, og tí roknar vinnuráðið við, at uppaftur fleiri fara at missa arbeiðið teir næstu mánaðarnar. Í summar kemur kanska ein bati, sigur vinnuráðið.

Steen Bocian, sum er búskaparfrøðingur hjá Danske Bank, sigur við Berlingske Tidende, at tað er ringt at fáa eyga á nakra framgongd í danska búskapinum í ár. Hinvegin fáa danir meiri pengar at brúka í ár, og hann roknar við, at teir fara at brúka nakað av pengunum, og at tann veksandi privata nýtslan fer at bjarga búskapinum í 2004.

## Útjaðarin størri stuðul

Ein nevnd mælir nú teimum norsku politikarunum til at økja stuðulin til at menna vinnulívið í útjaðaranum.

Nevndin sigur í sínum tilmæli, at síðani tíðliga í nítiárunum er norski útjaðarastuðulin minkaður eina helvt. Fyri at bøta um hetta mælir nevndin stjórnini til at geva útjaðarakommununum størri stuðul, sum tær kunnu medvirka til fleiri arbeiðspláss. Royndirnar hava víst, at tess meiri pengar, kommunurnar fáa frá tí almenna, tess fleiri arbeiðspláss verða skapt innan tænastuvinnuna, og at tað eru serliga kvinnurnar, sum fáa gagn av hesum.

Erna Solberg, kommunumálaráðharri, er ikki heilt samd við nevndina. Hon sigur við norska útvarpið, at almennir pengar hava sjálvandi sína ávirkan, men at rentustøðið, stattatrýstið og gjaldoyraviðurskiftini hava nógv størri týdning fyri vinnufyritøkurnar í útjaðaraøkjunum, serliga fiskavirkini.

## Víkingakvinna funnin

Russiskir fornfrøðingar hava funnið leivdirnar av einari norðurlendskari kvinnu í einum gravkamari, sum teir halda vera frá 10. øld.

Gravkamarið bleiv funnið uttan fyri býin Pskov í útnyrðingspartinum av Russlandi. Fornfrøðingarnir hava ikki funnið tekin um víkingar í sjálvum býnum, og tí halda teir, at norðbúgvarnir hava hildið til fyri seg sjálvar uttan fyri býin. Umframt leivdirnar av kvinnuni funni fornfrøðingarnir fleiri lutir úr silvuri og brosnu í gravkamarinum.

Víkingarnir vóru ofta við russisku eystrasaltsstrondina í 9., 10. og 11. øld, og teir sigldu javnan eftir teimum russisku áunum. Eitt nú nýttu teir áirnar Volga og Dnjepr, tá teir fóru til Konstantinopel, og á vegnum grundløgdu teir fleiri handilsbýir. Býurin Pskov er ein av teimum elstu í Russlandi. Tað elsta, sum vit vita um hann, stavar frá árinum 903.

# Fregnartænasturnar søgdu ikki sannleikan um hópoyðingarvápnini

**– Tað var ikki samsvar ímillum tað, sum vit fingu at vita um tey iraksku hópoyðingarvápnini, og tað, sum vit hava sæð, sigur trygdarpolitiski ráðgevin hjá George W. Bush, Condoleezza Rice. Í Bretlandi skal ovastin í fregnartænastuni til avhoyringar**

HÓPOYÐINGARVÁPN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

At eingi hópoyðingarvápn eru funnin í Irak fær nú myndugleikarnar í USA og Bretlandi at viðganga, at hesin parturin av grundgevingini fyri at leypa á landið var meiri enn ivasamur.

Fyri nøkrum døgum síðani segði amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, at hann hevði greitt frá tí, sum hann hevði fingið at vita frá fregnartænastunum, men at upplýsingarnar kanska ikki vóru heilt beinar.

Í gjár segði trygdarpolitiski ráðgevin hjá Bush, forseta, Condoleezza Rice, at gongdin í Irak hevur víst, at upplýsingarnar hjá fregnartænastunum samsvaraðu ikki við tað, sum amerikanararnir hava sæð í Irak. Hon kvikaði sær at leggja afturat, at hetta er kanska ikki so løgið, tá hugsað verður um, at Irak var eitt sera afturlatið land.

Amerikanska stjórnarumsitingin hevur leingi hildið uppá, at amerikanarar og bretar fóru at finna hópoyðingarvápn í Irak, men eftir at teir amerikonsku vápnaeftirlitsmenninir hava sagt, at eingi hópoyðingarvápn eru at finna í Irak, hevur stjórnin broytt støðu.

Í Bretlandi hevur tann trygdarpolitiska nevndin hjá Parlamentinum kravt, at leiðarin í fregnartænastuni, skal geva nevndini eina frágreiðing um upplýsingarnar um tey iraksku hópoyðingarvápnini. Samstundis krevja fleiri politikarar, at ein óheft kanning verður sett í verk fyri at fáa greiði á leiklutinum hjá fregnartænastuni og samskifti hennara við stjórnina.




# Hvalurin fór í luftina

**Ein 17 metrar langur og 50 tons tungur avgustur sprongdist mitt á gøtuni í Taiwan City**

HVALUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Avgusturin varð funnin deyður á einari strond seinasta leygardag. Av tí at hetta var størsti hvalur, sum nakrantíð hevur gjørt landgongd á Taiwan, gjørdu myndugleikarnir av at flyta hann til eina rannsóknarstovu, so serfrøðingar kundu kanna hann.

Aftan á at hava baksast við tann 17 metrar langa og 50 tons tunga hvalin í trettan tímar eydnaðist tað at fáa hann upp á ein stóran lastbil við viðfestivogni, men júst sum bilurin var á veg ígjøgnum Taiwan City, sprongdist hvalurin.

Hvalurin var sum vera man fullur av gassi eftir at hava ligið deyður í fleiri dagar. Innvølurin bleiv slongdur um alla gøtuna, og sambært blaðnum Taiwan News var lukturin stak ringur.



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1825, P/F Griffilin, 100 Tórshavn.

Viðtikið 16.12.2003 at lækka partapeningin við annulatión av egnum partabrøvum sambært § 48b, jvb kap. 7 í P/F-lógini, við kr. 100.000,00 til kurs 100 eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 29. januar 2004*

*Kristin Balle*

**Vetrar dansur**
leygarkvøldið 31. jan.

**Juliannu Boys Live**

**100,-**

Damur ókeypis atgongd frá 11.00 - 12.00

team85

*** HOTEL VÁGAR ***
THE AIRPORT HOTEL

**Serstøk menu:**

**Forrættur:**
Blinis á broysknum salati við skeljadjóragout
**Steik:**
Chateaubriand Bordelaise við frískum grønmeti og pommes a la creme
**Omaná:**
Surprice

**2 rættir 225,- fyri hvønn**
**3 rættir 250,- fyri hvønn**

Kømur úr 250,- fyri hvønn í dupultkamari

**- Atgongumerki til dans íroknað -**



FLOGFELAG FØROYA · SØRVÁGUR · TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · hotel@ff.fo

**Sølufólk**
til Elding í Saltangará

Elding í Saltangará søkir eftir sølufólki at byrja skjótast tilber.

Elding er leiðandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta at tú er ágrýtin og hevur hug og hegni at veita kundum okkara eina góða tænastu. Tað er ein fyrimunur um tú hevur útbúgving og royndir innan handil og sølu.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan 10. februar 2004 og skal sendast til:

**Elding, Postboks 24, 600 Saltangará**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá Oddfríður Gaardbo, leiðara, á tel 44 96 97

ELDING
- EIN BETRI LOYSN!

**Dagrøktarmamma**

**til Dagrøktina í Oyndarfjarðar kommunu**

Søkt verður eftir dagrøktarmammu til Kommunalu Dagrøktina í Oyndarfjarðar Kommunu at byrja skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá Sosialu deild hjá Runavíkar Kommunu á tlf. 417000.

Skrivlig umsókn skal vera Runavíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi 12. februar 2004.




**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur · 600 Saltangará

SANSIR · TEL 355 355

Val av limum til UMBOÐSRÁÐIÐ fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

- **Í februar mánaði ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

  Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2004.

  Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

  Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

  Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

- **Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

  Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

  Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi.

  Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

  Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni.

Tórshavn, 8. januar 2004
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · P.O.Box 329 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel+298 345600 · Fax+298 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo